# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Karsten Hansen misskilt sína uppgávu

Tað stendur á fíggjarlógini í løtuni. Hóast ovurstóru hækkanina av útreiðslunum í komandi fíggjarlóg, so koma umbønir um pengar allastaðni frá. Inntøkurnar eru eisini yvirmettar, so fíggjarlógin kemur at hava hall í ár. Hetta merkir, at Fíggjarmálaráðið í løtuni leitar við lúsakambi eftir øktum avgjaldsmøguleikum. Tað seinasta er so, at tað frá 1. juli ikki longur skal vera loyvt at innføra sigarettir tollfrítt.

Fyri tað fyrsta, so er tað sera vinnu- og borgarafíggindaligt at samtykkja nakað við so at siga ongum varsli, uttan at hoyra nakran. Fyri tað næsta, so eigur Karsten Hansen at steðga á eina løtu og hugsa um, hvat hansara arbeiði er. Hann er valdur í landsstýrið at umsita fíggjarmál. Hann er ikki lóggevari, hann er útinnari. Hann hevur ikki fingið mandat frá Føroya Løgtingi at ansa eftir heilsuni hjá føroyingum. Tað er heilt einfalt ikki hansara arbeiði.

Harafturat er tað skrúvan uttan enda. Fólk hava góðgæti við tollfrítt, tá tey hava verið uttanlanda. Hetta er neyvan heilsugott. Ferðafólk hava javnan eina fløsku av rúsdrekka við sær. Hetta er heldur ikki beinleiðis heilsugott. Men soleiðis hava vaksin fólk valt at disponera. Tað er so nógv her í verðini, sum ikki er gott fyri heilsuna. Konufólkaskógvar við høgum hæli eru neyvan góðir fyri føturnar, nógvar luktilsisvørur eru neyvan heilsugóðar. Merkir hetta, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum av sínum eintingum skal hækka avgjaldið á hesar vørur? Sjálvsagt ikki. Um KH hevur hug at løggeva niður um oyrini á vaksnum fólki um teirra egnu heilsu, eigur hann at fara úr landsstýrinum aftur í Løgtingið, har slík politisering eigur heima.

Fólk hava meir og minni skaðiligar óvanar, men talan er um vaksin folk, ið velja sjálvi. Tað er sjálvandi gott, um fólk gevast at roykja, men tað almenna kann bara fara til eitt vist, áðrenn man kemur til bann. At pilka sigarettir úr tí, ið man fær við sær til Føroya tollfrítt, er skeivt. Góðtaka vit, at KH við einum pennastroki kann avtaka tollfríu kvotuna av sigarettum við heilsu sum argument, so verður bara ein spurningur um tíð, áðrenn fíggjarmálaráðharrin ger tað sama við rúsdrekka og góðgæti.

Fyriuttan at atlit mugu vísast til ferðavinnuna, so vísa hagtøl, at føroyingar - arbeiðsgevararnir hjá KH - eru sera glaðir fyri tollfríu vørurnar, ið teir hava loyvi til at innføra. Vit innføra tollfrítt í stórum nøgdum. Tað er kanska júst tað, sum Karsten Hansen sær sum ein trupulleika?

Flutningsfyritøkurnar innan ferðavinnuna eru longu hóttar eftir lívinum av hækkandi oljuprísunum. Við seinasta pennastrokinum í FMR verða milliónir í umsetningi tiknar frá hesum feløgum. Og einasti máti at vinna hetta aftur er væl við øktum prísum, ið vit øll - eisini ikki-roykjarar - mugu bera.

Samgongan má seta Karsten Hansen uppá pláss, so føroyingar framhaldandi hava møguleikan at keypa tollfrítt, um teir hava hug.

**Sosialurin**

## Barnatænastan við sviðið so!



**VÁR Í GONG**
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Barnatænastan er lógarásett tænasta ætlað øllum børnum og barnafamiljum og fylgir tilráðingum frá Heilsustýrinum.

Henda tænasta er einasta heilsufyriskipan, ið er ætlað sum eitt fakligt trygdarnet á sosiala, heilsuliga og tí pedagogiska økinum. Tí er Barnatænastan einasti myndugleiki, sum kemur inn til allar barnafamiljur í Føroyum og sum hevur samrøður við øll skúlabørn, íalt 7.500 skúlabørn. Eisini er eitt tætt samstarv við sosialan, pedagogiskan og læknaligan mynduleika.

Barnatænastan er samansett av heilsufrøðingum, ið eru sjúkrarøktarfrøðingar, ið hava nomið sær eina serútbúgving innan heilsufremjan á barna og familjuøkinum.

**Manglandi játtan!**
Tað hevur í nógv ár verið sera torført at fingið fakfólk við hesi serútbúgving í starv.

Fyri fyrstu ferð nakarantíð eru øll størv sett. Í hesum døgum, tá tað annars er stórur mangul upp á starvsfólk, er týdningarmikið at halda upp á hesi starvsfólk. Men við játtanini í fíggjarlógaruppskotinum ber hetta ikki til!

**Nýggj kunngerð, uttan viðfylgjandi pening**
Í nov 2007 varð nýggj kunngerð til lóg um fyribyrgjandi heilsuslkipanir fyri børn og ung samtykt.

**Ráðgeving av starvsfólkum á m.a á stovnum og skúlum**
Ráðgeving til fakfólk viðv sálarligari, sosialari og likamligari heilsu og trivnað hjá børnum

Eftirlit viðv heilu og trivnaðarumstøðum á stovnum og skúlum

Eftirlit viðv reinføri og heilsu á skúlum

Skúlalæknan er tikin úr skúlunum, og gevir hetta Barnatænastuni eisini munandi størri ábyrgd á barna, familju og skúlaøkinum.

Tíðanverri má staðfestast, at hóast arbeiðsøki og uppgávur eru øktar, fylgir ikki peningur við.

**Broytingaruppskotið**
Avvarðandi leiðsla er gjørt varug við hesa støðu, so skjótt sum fíggjarlógaruppskotið var fari oman í tingi, men í broytingaruppskotinum til fíggjarlóg er ongin meirjáttan. Ì einum minnilutauppskotið stendur enntá, at uppskot er um at skerja Barnatænastuna við 1,2 mill. Hetta vildi verið at máa støðið undan stórum pørtum av hesi tænastu, og velja vit tí ikki at trúgva at Føroya Løgting tekur undir við hesum.

Vónandi vísa landsins myndugleikar ábyrgd, soleiðis at henda fyribyrgjandi og heilsufremjandi tænastu til okkara børn ikki verður fyri vanbýtið. Ov lítil játtan merkir minni heilsufremjandi tænastu til børn og barnafamiljur og kann ikki forsvarast í einum framkomnum samfelag, har tað í løtuni verður sett focus á fólkaheilsu.

## Sam í Kalsoynna og nýggj Rita til Nólsoyar!



**JÁKUP AV SKARÐI**

Stóra takk Bjørn Kalsø fyri skrivið á bls. 15 í Sosialinum 28. mai 2008!

Við tínum stuðli, kunnu bæði fólk í Kalsoynni og í Nólsoynni kenna seg trygg, at samferðslan kemur á tað støði, ið útoyggjar hava tørv á í 2008.

Eg taki fult undir við áskoðan tíni, at Sam skal verða trúgvur í siglingini um Kalsoynna. Tó hongur tað saman við at Ritan verður skift út, soleiðis at við í Nólsoy eisini hava møguleika at fáa annað enn trillibóru og persónbilar til Nólsoyar!

Vónandi kann tú gera títt til at politikkarar halda orð og fáa okkum nýggju ferjuna at røkja farleiðina um Nólsoyarfjørð komandi summar. Tað ber til, um peningur er tøkur at skipa útbjóðingartilfar, kanna tilboð o.a., soleiðis at byggjast kann í januar. Kanska vit kunnu bakka ein tumma og siga at tað gerst ikki við okkum um vit bíða einar tveir mánaðir, men so heldur ikki meira.

Okkum er lovað nýggja ferju á sumri 2009 og tó at hetta er nakað seinni enn tað sum áður er lovað okkum, so seta eg álit á tykkum fólkavaldu at tit eisini hugsa um okkum, ið eru nær og tó so fjar - og kanska telja í so lítið millum allar atkvøðurnar norðanfjørðs.

Fá okkum nýggju ferjuna í bygging og tryggið tykkum harvið trygga samband tykkara - hjálp til sjálvhjálp.

Við samferðslukvøðu

## Áheitan á limirnar í fiskimannafelagnum



**JAN HØJGAARD**
formaður í Føroya Fiskimannafelag

Fiskimannafelagið heitir á limir sínar um ikki at gera sjálvstøðugar avtalur við reiðarar, hóast meginreglan er, at slíkar avtalur, sum ikki eru í samsvar við sáttmálan, eru ógildugar.

Um fiskimaðurin kortini ger serliga avtalu við reiðara, so kann hetta vísa seg at hava víðfevndar neiligar avleiðingar fyri einstøku sjófólkini. Hesi kunna fara niður í løn, og missa aðrar sáttmála- og lógarágóðar, so sum eftirløn, trygging og frítíðarløn, hóast hetta er brot á sáttmálan og landsins lógir.

Fiskimannafelagið heitir á reiðarafelagið, um at fáa limir sínar um at halda galdandi sáttmála.

Eisini heitir felagið á manningarnar um at venda sær til fiskimannafelagið, um galdandi sáttmáli ikki verður hildin, ella um reiðarar royna at fáa øðrvísi avtalur við manningarnar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.